# Krabbameins-virkisætlan fyri Føroyar

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, hava á fundi við Krabbameinsfelagið boðað frá, at ein føroysk virkisætlan á krabbameinsøkinum verður við í eini fólkaheilsuætlan**

KRABBAMEINS-ÆTLAN

Ein krabbameinsvirkisætlan fyri Føroyar er nú nærri veruleikanum.

Á fundi í farnu viku kundu Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, greiða umboðum úr Krabbameinsfelagnum frá, at fyrsta stigið til eina føroyska virkisætlan á krabbameinsøkinum er niðurfelt í fólkaheilsuætlanina, sum verður løgd fyri tingið í næstum.

**Áheitan frá Krabbameinsfelagnum**

Landsstýrismaðurin upplýsti harumframt, at næsta stigið verður at seta ein serfrøðingabólk at gera virkisætlanina.

Jákup N. Olsen, formaður í Føroya Felag móti Krabbameini, fegnast um, at løgmaður og landsstýrismaðurin í heilsumálum hava tikið áheitanina frá Krabbameinsfelagnum í so stórum álvara og so skjótt.

Tað var í februar, at Føroya Felag móti Krabbameini heitti á løgmann, ið er verji hjá Krabbameinsfelagnum, um saman við felagnum at seta sjøtul á arbeiðið at orða eina krabbameinsvirkisætlan fyri Føroyar.

Áheitanin varð send í sambandi við visjón 2015. Ein krabbameinsvirkisætlan er ein heildarætlan, ið umfatar fyribyrging av krabbameini og viðgerð og røkt av krabbameinssjúklingum.

Tíverri eru Føroyar, sum er, eftirbátur á hesum økjum. Skal krabbameinsøkið mennast og viðgerðin vera á sama stigi sum í londunum kring okkum, er alneyðugt, at vit í Føroyum fáa eina virkisætlan, ið kann seta út í kortið, hvussu vit skipa fyribyrgjandi tiltøk og hvussu krabbameinsviðgerin og -røktin mennist á best møguligan hátt í komandi árum, siga umboð fyri Føroya Fealg móti krabbameini.

**ave**



*Løgmaður og landsstýrismaðurin í heilsumálum saman við Jákup N. Olsen, formaður í Føroya Felag móti Krabbameini*

# Met um bestu fløguna í Miðlahúsinum

**Deja Vu og Høgni Lisberg fara mikukvøldið á pallin í Miðlahúsinum í Vágsbotni at framføra løg av bestu fløgunum í 2005, sambært lesarunum hjá Dimmalætting og Sosialinum**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Mikukvøldið klokkan 19 verður konsert í Miðlahúsinum við monnunum handan bestu fløgurnar í 2005. Deja Vu átti við fløguni A Place To Stand On, sambært lesarum hjá Dimmalætting bestu fløgu í 2005, meðan fløgan Morning Dew hjá Høgna Lisberg vann sama heiður á Planet Awards.

Høgni Lisberg fer at framføra løg av Morning Dew. Deja Vu fer somuleiðis at spæla nakað av A Place To Stand On, so her verður møguleiki at meta um sjálvur hvørji løg hava munin. Ella bara njóta tónleikin, ið ferðast innan inniligan popp.

Konsertin er í samband við, at fleiri føroyskir bólkar fara til Reykjavíkar í næstu viku, at hava konsertir fyri íslendingum. Hetta er eitt sokallað AME-Reykjavík (Atlantic Music Event) tiltak, sum Menningarstovan, Tutl og Norðurlandahúsið skipa fyri í felag.

Endamálið við ferðini er at skapa áhuga fyri føroyskum tónleiki í Íslandi. Høgni Lisberg og Deja Vu eru við í hópinum, sum fer til Íslands, og konsertin í Miðlahúsinum er tískil ein lítil upphiting fyri teir báðar bólkarnar, og eitt kærkomið høvi hjá føroyingur at smakka nakað av tí, ið íslendingar fáa borðreitt.

Konsertin byrjar kl. 19 og er til umleið 21.30. Kostnaður er 100 kr. Hósdagurin er frídagur, so vónandi verða nógv andlit at síggja í Miðlahúsinum mikukvøldið.

# Pætur, Eyðun og Tróndur á Skarv

**Pætur við Keldu, Eyðun Nolsøe og Tróndur Enni fara saman á pallin leygarkvøldið í føroyska vertshúsinum í Keypmannahavn, Skarv**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsunidam@sosialurin.fo*



*Myndatekstur: Tróndur Enni, Pætur við Keldu og Eyðun Nolsøe venja í løtuni á Oyrasundskollegiinum.*

*mynd: ES*

Leygarkvøldið leggur Skarv pall til eina sera roynda og dugnaliga Trio. Pætur við Keldu á tangentum og sangi, Eyðun Nolsøe á kassagittara og sangi og Trónd Enni á trompet, bassi og sangi.

Hvør sær, eru teir allir tríggir kendir sum sangarar og tónleikarar, Pætur við Keldu, føroyski sangarin í danska grand prixnum, tangentleikari í Frændum og sum eintaklingur og í bólkinum Tiðnað á kristna føroyska tónleikapallinum. Eyðun Nolsøe, oddamaður í Frændum og sum einstaklingur ella saman við Terja. Tróndur Enni er ein tann besta songrøddin, ið er komin av Tvøroyri seinastu árini, hann hevur spælt rættiliga nógv í ymiskum samanhangum og sum einstaklingur.

Hetta eru fyrstu ferð, at henda trio fer á pallin á Skarv. Teir venja í løtuni óført. Eisini inni á Skarv verður í hesum døgum fyrireikað til kvøldið. Seinasta vikuskiftið gekk ein forstyrkjari fyri, júst eins og annleggið gekk fyri, tá Kári P. herfyri spældi konsert har. Tí verða ljóðumstøðurnar nú betraðar.

Skarv hevur opið mikudag, hósdag, fríggjadag og leygardag hesa vikuna. Øll kvøldini er tað DJ ESJ, ið leggur tónleika á, hann leggur somuleiðis tónleik á, leygarkvøldið tá livandi tónleikur ikki er á pallinum.

# Virka fyri teldutøkari ættargransking

**Ættargranskingarfelagið KT Slekt hevur havt aðalfund. Felagði arbeiðir við at gera alt ættargranskingartilfar teldutøkt**

ÆTTARGRANSKING
*Tíðindaskriv*

Aðalfundurin samtykti at heita á Landsskjalasavnið um at fáa innheinta alt tað tilfar, sum Landsskjalasavnið eftir lógunum eigur at liggja inni við. Eitt nú skulu allar upplýsingar í kirkjubókunum, við undantak av ættleiðingarmálum, verða tøk á Landsskjalasavninum, tá tær eru eldri enn 50 ár.

Tríggir nevndarlimir Göran Wennerström, Sofus D. Johannesen og Steinbjørn í Dali stóðu fyri valið. Allir blivu afturvaldir.

Limatalið hjá felagnum veksur støðugt. Við árslok í 2005 vóru 480 limir. Av teimum eru eini 60 uttanlands úr sjey ymiskum londum.

Í felagnum KT Slekt møtast limirnir bert einaferð um árið, og tað er á árliga aðalfundinum. Dagliga samskifta limirnir bert heimasíðuna www.genealogi.fo, sum er sera vælumtókt. Kjaktorgið og tær innskrivaðu fólkateljingarnar eru best umtóktar av teimum út við 200 dagliga vitjanunum á heimasíðuni.

Á heimasíðuni eru millum annað meira enn 54.000 nøvn úr fólkateljingum frá 1801 og frameftir, sum limir felagsins kunnu leita í. Tað gongur støðugt framá at skriva fólkateljingar inn, men felagið sóknast eftir fólki at skriva inn fólkateljingarnar úr Norðoyggjunum.

Felagið arbeiðir eisini við at skráseta allar gravir í Føroyum. Nakað av tilfari er longu tøkt á heimasíðuni.

Ein onnur størri verkætlan, sum felagið ætlar sær undir er, at skriva allar kirkjubøkur inn á teldu, soleiðis at tær eisini verða teldutøkur hjá limunum. Avtala er gjørd við danskt systurfelag um loyvi at brúka teirra telduskipan til innskrivingina.

Sparikassagrunnurin hjá Føroya Sparikassa hevur stuðlað felagnum at gjøgnumføra verkætlanina við teldutøkum fólkateljingum. Peningurin er brúktur til keyp av tænastum frá Landsskjalasavninum. Hesin peningur er nú uppbrúktur, og felagið noyðist at fíggja restina av verkætlanina við limagjaldsinntøkum, um felagið ikki fær annan stuðul.

KT SLEKT er ættargranskingarfelag hvørs endamál m.a. er at fáa ættargranskingartilfar teldutøkt.

Í nevnd felagsins sita: Göran Wennerström, formaður, Hans Suni Jensen, næstformaður, Randi Á. Jakobsen, skrivari, Sofus Johannesen, kassameistari, Steinbjørn í Dali, netumsitari.